# EIN TAXATÚRUR

**ÓLAVSØKAN 1972** Um ólavsøkumundið í 1972 varð hýruvognsførarin Manni Waag Høgnesen í Klaksvík leigaður ein ballingartúr úr Hvannasundi til Havnar. Túrurin, sum sigur nakað um mentanina tá í tíðini, vardi í heilar 96 tímar ella fýra samdøgur

Birgir Waag Høgnesen

Vit hava sett Manna Waag Høgnesen stevnu á Viðareiði, har hann býr saman við unnustu síni Guðrið, sum er ættað úr Vági.

Manni, ið er best kendur sum koyrilærari og ikki minst sum ein av teimum sum spældu við 66-liðnum hjá KÍ, hevur í síni tíð koyrt taxakoyring hjá pápabeiggjnum Hjørleifi í Klaksvík, sum tá hevði hýruvognsstøðina Auto og sjálvur átti upp til 10 taxabilar samstundis. Seinni keypti Manni sín egna bil til taxakoyring.

Endamálið hjá okkum við túrinum á Viðareiði, er at fáa Manna at siga frá einum túri í 1972, sum vardi í heilar 96 tímar. Við einum smíli greiðir Manni frá, at mentanin tá var ikki sum nú. Tá í tíðini vóru nógv línuskip í Klaksvík, og vanligt var at línufiskimenn, sum høvdu verið á Flemish Cap í upp til 8 mánaðir, ringdu og bóðu ein taxabil standa fyri teimum, tá ið báturin legði at bryggju.

Teir yngru bilførararnir vóru oftari bidnir at koyra, tí tað kravdist eitt ávíst tol við monnum, sum sótu og drukku seg fullar í bilinum í upp til fleiri tímar, sigur Manni.

Tá báturin legði at, og alt lagaði seg væl, var bein kós sett ímóti goymsluni hjá Skipafelagnum Føroya, har plattar og aftur plattar av øli stóðu og bíðaðu eftir tystum línumonnum. Manni sigur, at tað var eingin sjálvfylgja fyri hesar menn, sum í flestu førum vóru ungir og leysur dreingir, at fara heim til hús við klæðum og øðrum tingum, nei nú var herja á tað, sum bíðað hevði verið eftir í longri tíð, nevniliga spruttið.

**»» Tað var siðvenja tá at hesir sjómenn høvdu keypt kasettubond við country-tónleiki heim við at geva bilførarunum**

Tað var siðvenja tá í tíðini, at hesir sjómenn høvdu verið í landi og keypt kasettubond við t.d. countrytónleiki heim við til at geva bilføraranum. Hesi kasettubondini koyrdu so í døgndrift í bandavspælarunum.

Eg vil siga tað so, sigur Manni, at man undraði seg mangan yvir, hvussu hesir menn kláraðu at vera fiskimenn, tí tað kom meiri enn so fyri, at tað vóru bert einir 5 til 10 dagar til báturin fór avstað aftur, og at menninir stórt sæð ikki høvdu verið heima við hús, men høvdu koyrt í taxabili í Klaksvík frá tí teir komu, til teir fóru aftur á línuveiðu í upp til 8 mánaðir.



## Ein søga fyri seg

Tann eini túrurin í 1972 var ein søga fyri seg, sigur Manni. Tað var 26. juli. Talan var um tríggjar júst afturkomnar línufiskimenn úr Hvannasundi, sum ringdu til bilstøðina Auto og spurdu eftir bili nr. 4, sum eg átti og koyrdi. Støðdaman rópti á meg í sendarinum og segði, at hvannasundsmenninir ynsktu, at eg skuldi koma norður til Norðdepli í ein fart, tí tað vóru einans 25 minuttir til strandfaraskipið Ternan fór av Klaksvík til Leirvíkar, og teir skuldu við. Teir skuldu á Ólavsøku.

Dagin fyri tann 26 juli hevði eg verið á goymsluni hjá Skipafelagnum, saman við hesum monnum og fylt bilin, sigur Manni. Viðførisrúmið var nú proppað við finspritti, Den med tyren og ein størri nøgd av øli, sum teir bóðu meg hava í bilinum til dagin eftir. Óvitandi um hvat tann 27.juli 1972 fór at bjóða, fór eg við nógvari ferð norður til Norðdepli at heinta menninar, sum komu úr Hvannasundi við lítlu og sera sjarmerandi ferjuni, sum æt Selurin.

Teir koma algoystir í land, og bóðu meg koyra so skjótt eg megnaði til Klaksvíkar, tí nú var ballingarturin byrjaður. Meðan vit koyra í tí tunlinum sum er nærri Klaksvík, spyr tann eini hvannasundsmaðurin »Tú Manni, kanst tú ikki bara koma við til Havnar«, eg svaraði ja, sum í tóman heim, sigur Manni.

Men mennirnir tóku hetta fyri góða vøru. Nærri vit komu, har sum Ternan plagdi at liggja, jú meira gongur tað upp fyri mær,



**Biltakstir pr. 1. nov. 1971**

| | Takst I 8.00-17.00 | Takst II 6.00- 8.00 17-24.00 Sunnu- og halgidagar | Takst III 24.00-6.00 |
|---|---|---|---|
| Tímakoyring | 35,- | 40,- | 45,- |
| Býtúrir | 7,- | 8,- | 10,- |
| Oyrar | 9,- | 10,- | 12,- |
| Ánir | 9,- | 10,- | 12,- |
| Strond | 12,- | 13,- | 15,- |
| Árnafjørð | 18,- | 20,- | 22,- |
| Depli | 25,- | 30,- | 35,- |
| Norðtoftir | 30,- | 35,- | 40,- |
| Norðdepli | 30,- | 35,- | 40,- |

Skúlakoyring kr. 45,- um tíman.
Busstakstur innanbýggja: vaksin 2,00 børn 1,00
Rututakstir: Klaksvík Norðdepli vaksin 8,- børn 4,-
Klaksvík-Árnafjørð - 5,- - 3,-
Frakt send við rutu 3,00 pr. kolli.

BILSTØÐIRNAR Í KLAKSVÍK

**TAKSTIRNIR TÁ**

*Hetta vóru takstirnir fyri hýruvognskoyring tá í tíðini*